# KT-fólk til Atlants Tøkni

Virksemið hjá KT-fyritøkuni Atlants Tøkni er í støðugari menning, og søkt verður nú eftir einum KT-serfrøðingi og einum KT-forritara til starvsfólkahóp okkara.



**Atlants Tøkni** · *Jónas Broncksgøta 35*
*Postsmoga 277 · FO-110 Tórshavn*
*Tel 347 280 · Faks 347 281*
*att@att.fo · www.att.fo*

## KT-serfrøðingur

Tú hevur fleiri ára royndir at menna ritbúnað. Harumframt hevur tú:

- Hægri útbúgving í KT, tvs. embætisprógv ella ph.d.
- Sjálvstøðugt arbeiðslag
- Áræði, hug og evni áhaldandi at tilogna tær nýggja vitan og tøkniligar førleikar

Tann, ið fær starvið, fer at:

- Hava tøkniligu ábyrgdina av verkætlanum
- Standa fyri arbeiðinum at byggja upp KT-skipanir frá grundini
- Leggja til rættis og ganga á odda, tá nýggjar loysnir skulu mennast

## KT-forritari

Tú hevur útbúgving í KT (bachelor, kandidat ella líknandi) og helst eisini royndir á økinum. Ert tú um at gera útbúgving tína lidna, hoyra vit eisini fegin frá tær. Arbeiðið fevnir um at menna KT-skipanir í breiðum týdningi.

Tann, ið fær starvið, verður við í nýskapandi verkætlanum og gerst partur av einum fakliga mennandi arbeiðsplássi. Tøkniligu starvsøkini eru:

- .NET
- Visual Studio
- C++
- C#
- Oracle
- Java
- JDeveloper

Fyri bæði størvini er galdandi, at ein fær góða løn, ið svarar til førleikarnar. Send okkum umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi.

NEMA *Atlants Tøkni er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.*

Atlants Tøkni

REPROZ

Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Nærverkið søkir eftir røktarstarvsfólki til Heimatænastuna í Suðurstreymi at byrja 1. november ella eftir nærri avtalu. Sóknast verður eftir heilsuhjálparum/heilsurøktarum at starvast í blandaðum vaktum úti í Heimarøktini. Talan er um føst størv í starvsbrøki eftir avtalu.

**Setanartreytir:**
Lønar – og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Talan er um størv í Heimatænastuni við fyribils tænastu í Øki 1.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran Ceciliu Vestureið á telefon 31 72 49 ella 217249.

**Umsókn**
Umsóknir saman við prógvi, autorisation og upplýsingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til:

Heimatænastan Suðurstreymoy
Stílað: Økisleiðarin
Skálatrøð 14.
FO 100 Tórshavn
Merkt »Umsókn«

**Umsóknarfreist: 23. oktober 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




STUDIO PEGASUS tlf 456500